## Hvør bygd sítt valevni

Til býráðsvalið í Klaksvík hava flokkarnir gjørt sítt til at fáa valevni út útjaðarinum í kommununi. Hetta hevur eydnast hjá teimum stóru flokkunum: Hjá fólkaflokkinum stillar býráðslimurin Atli Justinussen úr Árnafirði upp, hjá sambandsflokkinum Jákup Skoradal av Norðoyri, hjá javnaðarflokkinum býráðslimurin Signhild Joensen av Trøllanesi og hjá tjóðveldi hevur borgarstjórin í Svínoy, Eyðun Jacobsen stillað upp.



## Kryvjivirki farið í gongd

Nýggja kryvjivirkið, sum P/f Luna hevur bygt í Sørvági, er nú byrjað at kryvja laks. Virkið er sera framkomið, snøgt og arbeiðsgongdin er løtt. Tað arbeiða 18 fólk í kryvjingini. Á virkinum verða kruvd á leið 30 tons um dagin, men Óli Hansen, virkisleiðari, sigur, at framleiðslan kann tvífaldast uttan tær stóru íløgurnar. P/f Luna hevur aliloyvi á Gøtuvág, Sandavági/Miðvági og á Sørvági. Smoltini til alistøðinar koma øll frá smoltstøðini á Fútakletti. Væntandi fer ársframleiðslan hjá Luna at liggja um 6000 tons, ið kuldi givið arbeiði til hvønn dag í árinum.

# Ein heilsubýur við lívsstíli

**Klaksvík gjørdi rættiliga um seg á Lívsstílsstevnuni í ítróttarhøllini á Hálsi um vikuskiftið. Kommunan hevði egnan bás, har nógv fólk vitjaðu, millum annað heilsumálaráðharrin, Hans Pauli Strøm**

HEILSA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** - Jeg var so glaður at hoyra, at tykur eisini vóru við á stevnuni!

Nøkulunda soleiðis segði landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm við Dávur Winther, mentanarleiðara hjá Klaksvíkar kommunu.

Eftir at hava sett stevnuna, gekk Hans Pauli Strøm runt og vitjaði ymsar básar. Og hann kom í hesum sambandi eisini á gátt á básinum hjá Klaksvíkar kommunu.

Hann hevur áður lýst Klaksvík sum heilsubý okkara, og fyri klaksvíkingar var tað tí sjálvsagt, at tey áttu at taka lut á stevnuni, sum Synergi skipaði fyri.

### Heilsan á breddan

At Klaksvík er lýstur sum heilsubýur kemur ikki av ongum. Bæði í verki og við kunning hevur ein sett sær fyri at liva upp til hetta heitið.

Eitt av hesum tiltøkum er ein stórur faldari, sum vísir hvørjir møguleikar og hvørji tilboð finnast til at betra um sína egnu heilsu í næststørsta býi okkara.

Eitt úrslit av hesum átakinum er, at í summar hava eini 400 fólk runnið hvønn einasta leygardag eftir eini renniskrá sum ítróttarfelagið Treysti hevur skipað fyri.

- Tit hava rættiliga sett heilsuna á breddan, og tí kunnu tit av røttum kalla tykkara bý fyri ein heilsubý, helt Hans Pauli fyri inni á básinum hjá klaksvíkingum »Klaksvík - ein Heilsubýur«.

Á hesum básinum var hesin heilsufaldarin at fáa og vístur á veggin. Umframt hetta kunnaði Helena Pætursdóttir um virksemið hjá Artharmonia á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Umframt hetta máldi Sigrun Heldarskarð, sjúkrasystir lungnaorku á stevnugestunum og Jóhanna á Tjaldrafløtti greiddi frá um heilsugóðan mat og kunnaði annars um virksemið á Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík.

Ein teirra sum fekk málda lungnaorku sína var júst Hans Pauli Strøm. Á básinum kundi ein bert staðfesta, at landsstýrismaðurin hevði góð lungu.

- Ja, Hans Pauli hevur lungu sum ein unglingi. Tað kemur ikki uttan orsøk, tí hann rennur fimm ferðir um vikuna og er haraftrat tilvitaður um skynsaman lívsstíl, verður sagt av básinum hjá klaksvíkingum.



*Sjúkrasysturin, Sigrun Heldarskarð hevur júst staðfest, at heilsumálaráðharrin, Hans Pauli Strøm hevur góð lungu*
*Mynd: Dávur Winther*

# Vakrasta hárið á stevnuni

Umframt alt tað sum ein kundi eygleiða á teimum 54 básunum á Lívsstílsstevnuni um vikuskiftið, var ein Hárfríðkanarkapping.

Hetta var eitt av hæddarpunktunum leygardagin, tá høvuðsdómarin Sunneva Thorsteinsson frá Hárfríðkanars kúlanum,Vera Larsen frá Veru Klipt úr Klaksvík og Tini Owild, sum er kendur danskur stylistur og style coach skuldu siga sína hugsan.

Í kappingini millum lærlingar í harraklipi við liti og í kappingini í uppseting við langum hári vann Ann Leivsgarð Henriksen, frá Karin'sa.

Í kappingini millum sveinar í damuklippi við liti og í uppseting við langum hári vann Elisabeth M. Danielsen frá Monroe, í harraklippi við liti vann Anja Fries Weyhe frá Diva Dupont. Hon vann eisini hendan heiðurin í fjør.

**sb.**



*Mong ymisk hársnið vórðu víst fram á Lívsstílsstevnuni um vikuskiftið*